## VIÐMERKINGAR

# Ein vanvirðing av pensjonistunum

**Eyðólv Dimon**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Rúna Sivertsen harmaðist frá tingsins røðarapalli, at flestir fiskimenn vóru illa fyri, tá teir um fimti ára aldur, av heilsuávum, vórðu noyddir at fara í land. Hesum kunnu øll taka undir við, men samstundis er torført at skilja, at Rúna Sivertsen er kúrr, nú samgongan krevur, at føroyskir pensjonistar skulu fara aftur til sjós ella gerast virknir á arbeiðsmarknaðinum, um teir skulu fáa betra síni pensjónsviðurskifti. Teir pensjonistar sum ikki gera hetta, fáa einans 400 kr. afturat um mánaðin. So lítið lá aftanfyri lótirnar hjá Fólkafloks tingliminum.

**Ein rættur at gerast pensjonistur.**
At kunna gerast pensjonistur er ein rættur, og tey eldru skulu ikki noyðast at fara til sjós ella út á arbeiðsmarknaðin fyri at fáa endarnar at røkka saman. Seinasta útspælið hjá Landsstýrinum, sum einki hevði við betran av pensjónsviðurskiftunum at gera, er tí einki annað enn ein vanvirðing av pensjonistunum. Hetta er borgarligur politikkur, tá hann er bestur. Fyri reiðararnar og stjórarnar, sum kunnu fáa niðursetta tíð og samstundis áseta sær tímalønina, er hetta uppskotið kærkomið. Men fyri vanliga løntakaran og fiskimannin er sjónligt, at í samgonguni hava teir ongan stuðul.

**Í læntum fjarðum**
Samgongan hevur í fýra ár tosað um, at hon fór at koma við eini nýggjari pensjónskipan, og nú teirra seinasta fíggjarlóg varð samtykt, so var framvegis onki oyra sett av til hækkan av pensjónunum. Tá januar mánaði var hálvrunnin, boðaði landsstýrið til kunningarfund um hækkan av pensjónunum. Men tá til stykkis kom, so vórðu nakrar skattalógarbroytingar lagdar fram. Fyri at lógarbroytingarnar skuldu smakka betri hjá veljaranum, so vórðu tær nevndar hækkan av pensjónunum. Harnæst vísti tað seg, at kommunurnar skuldu bera kostnaðin av lógarbroytingunum. Sanniliga í allar mátar ein lógarbroyting í læntum fjarðum. Ein skattalóg, sum verður kallað pensjónslóg og er samtykt av løgtinginum, men sum kommunurnar skulu gjalda.

**Hetta er pensjóns politikkur**
Her skal broyting koma í. Javnaðarflokkurin setur sum treyt fyri at fara í eina komandi samgongu, at pensjónirnar verða hækkaðar tey komandi fýra árini, so at tær í 2005 eru 10.000 kr. fyri støk og 16.000 fyri hjún. Rættindini hjá pensjonistunum fara ikki at verða sett eftir, hvussu nógv ein hevur orkað at goldið til eina pensjónskipan. Hvussu høga løn ein hevur fingið, meðan ein var í arbeiðsførum árum, fer heldur ikki at ávirka útgjaldið. Tá tey gomlu náa pensjónsaldurin, kunnu tey liva árini sum pensjonistar, og tey skulu ikki tvingast til sjós ella út aftur á arbeiðsmarknaðin sum uppskotið hjá samgonguni vil.

**Okkara uppskot**
Hetta skal m.a.gerast við at Samhaldsfasti, sum samgongan hevur ynskt har pipari grør, verður styrktur. Stovnsfæið verður munandi økt, og inngjaldið frá arbeiðsgevara og løntakara verður hækkað úr _-2%. Økingin í inngjaldinum far løntakarin aftur við samsvarandi lækking í skattinum. Hetta er ein pensjónspolitikkur, sum fyrst og fremst virðir rættin hjá eldru borgarunum at gerast pensjonistar, og har rættindini hjá pensjonistunum heldur ikki verða sett eftir, hvussu nógv ein hevur orkað at goldið til eina pensjónskipan.

# Roykilok stuðlar til færri krabbameinstilburðir

### Dalandi tubbaksnýtsla stuðlar til færri krabbameinstilburðir hjá monnum

**Karin Dahl Hansen**

Talið á monnum, ið fáa staðfest lungnakrabbamein lækkar ár um ár av tí, at fleiri menn hava sloppið sær av við tubbakkið. Harafturímóti gjalda kvinnurnar alsamt prísin við fleiri lungnakrabbameinstilburðum, av tí, at tær guvaðu stútt í nítjanhundrað og sjeyti árunum. Men eisini kvinnurnar har eru hildnar uppat við at roykja og er tað tí bert ein spurningur um tíð, áðrenn talið á kvinnum, ið fáa lungnakrabbamein, dalar.

– Um eini fimm ár, haldi eg at talið á nýggjum lungnakrabbameinstilburðum hjá kvinnum fer at dala, so sum tað longu er hent hjá monnunum, heldur Jørgen Falk, kunningarráðgevi hjá »Center for Forebyggelse«.

Frá tí, hildið verður uppat við at roykja, og til vandin fyri at fáa lungnakrabbamein er munandi minkaður, ganga umleið tíggju ár, og tí tekur tað eina tíð, áðrenn teir færru roykjararnir síggjast aftur í krabbameinshagtølunum.

– Vit eru um at heysta úrslitið av fólkaheilsutiltøkunum, og av tí, at amtini nú taka roykiloki í álvara og bjóða avvenjingarskeið. Og tað hevur nakað at siga fyri deyðatalið av tí, at lungnakrabbamein er ein av krabbasjúkunum, ið er drepandi, sigur Hans Storm, deildarlækni í »Kræftens Bekæmpelsi«. Bert fimm prosent av lungnakrabbameinssjúklingunum verða lekt.

Í 1998 fingu stívliga 1300 kvinnur og knappliga 2000 menn lungnakrabbamein, meðan talið tíggju ár fyrr, fyri menninar var 2250. Afturgongdin í lungnakrabbameinstilburði er hjá tí partinum av monnum í fimtiárunum og í byrjanini av sekstiárunum, sum er í vinnu, sjónskast.

– Roykilok er ein ógvuliga góð íløga fyri samfelagið. Tað hevur nógv at siga fyri trivnaðin hjá fólkinum, men eisini fyri tær upphæddir, ið vit brúka í heilsuverkinum til viðgerðirnar, sigur Jørgen Falk.

Hann vísir til California í USA, har talið á roykjarum er fallið, og tað er enda við einum eyðsýndum falli í talinum á lungnakrabbameinstilburðum og blóðreinslusjúkum.

– California er prógvið um, at tann langi, áhaldandi leikur gevur ágóða í færri sjúkum og deyðum, sigur Jørgen Falk.

# Finnbogi og Signar takka fyri seg

**Thomas Arabo**



Um báðar kann sigast, at teir hava verið realpolitikarar. Teir mundu nokk, saman við Petur Reinert sála, vera drívmegin aftanfyri, at fáa Tjóðveldisflokkin út úr sínari nationalistisku isolatión mitt í 70unum. Viðspælarin í Javnaðarflokkinum var tann ikki minni realpolitiski Atli Dam.

Hesir nevndu tyktust hava tað til felags, at skuldi tað skapast góðar fyritreytir fyri tað fólk, ið her býr, so nyttaði ikki at finna reinar -ismu loysnir - tað verði seg nationalismu, kapitalismu ella sosialismu - men praktiskar loysnir, ið hóskaðu til samfelagið bæði í dygd og støðd. Sjálvandi vóru loysnirnar merktar av holdningum hjá teimum, ið funnu loysnirnar, men tað avgerandi var, at nýtuligar loysnir vóru funnar.

**Framburður og ábyrgd**
Tað sum føroyingar helst minnast makkaraskapið Finnboga og Atla best fyri, er nokk keypið av Smyril í 1975 - eitt frambrot í føroyskari samferðslusøgu. Av øðrum í sama valskeiði kann nevnast yvirtøkan av Postverkinum og stovnsetan av føroyskari Vaktar og Bjargingartænastu.

Í 1993/94 var Finnbogi landsstýrismaður í fíggjarmálum í eini tíð, tá tað ráddi um at halda undir botnin á landskassanum, so hann ikki fór undan, og ikki sum nú, har tað ræður um at halda lokinum, so tað ikki dettur av. Eisini var hann altíð við í samráðingunum undir leiðslu av Maritu Petersen sálu. Har var hansara praktiska nøs sanniliga hent.

**Avloysararnir**
Signar sær út til at hava fingið ein avloysara. Orðaríki skiparin á Glyvrum sær út til at hava sum høvuðsmál at brenna brúgvar til restina av tí politisku verðini. Syndarligur varði at seta yvir semjusøkjarin Signar, ið vónandi enn kemur at hava ávirkan í Tjóðveldsiflokkinum.

Hvør so avloysir realpolitikaran Finnboga - ja tann avloysarin er so ikki í eygsjón í Tjóðveldisflokkinum í løtuni!

# Viðm. til stórskúla í umbúna í Eysturoynni

**Marjun Gaardbo**
*borgarstjóri*



Skrivað hevur verið hesar seinastu dagarnar um stórskúla í Eysturoynni og at Nes kommuna sum hin einasta longu hevur boða frá, at hon ikki fer at luttaka í nøkrum stórum skúlasamarbeiði í Eysturoynni.

Orsøkin til hesa støðutakan hjá Nes kommunu er, at Tofta skúli nøktar verandi tørv nøkur ár fram, og at Nes kommuna hevur arbeitt við og gjørt tekningar av eini komandi víðkan av Tofta skúla, sum m.a. umfatar nýggja fimleikahøll, teldurúm, bókasavn og sangstovu. Hesa skúlavíðkan sleppa vit ikki undan at gera, og meta vit, at fyrsta útbyggingarstig hjá okkum er komið so mikið langt, at vit gera ongar broytingar nú.

Nes kommuna er ikki fyri at flyta 8. og 9. flokk í løtuni, men vit hava ikki nakað ímóti at byrja bleiv við 10. flokki sum t.d. kundi farið inn á Kambsdal, hetta sum eina roynd. Á Kambsdali eru møguleikarnir góðir, har er ein stór ítróttarhøll, kantina og møguleikarnir annars sera góðir. Harafturat eru møguleikarnir betri fyri at næmingarnir fáa síni ynskir um vallærugreinar uppfylt.

Ein annar møguleiki er samstarv millum skúlarnar um vallærugreinar. Hesa loysn kundi møguliga verið byrjað uppá komandi skúlaár.

Sjálvandi eiga vit alla tíðina at vera vakin yvir fyri komandi menning og fólkavøkstri í okkara øki, og royna at loysa trupulleikarnar so hvørt – helst áðrenn teir koma.

# Fiskimálaráðharrin má fara at taka sítt starv í størri álvara

### Ikki øll vinnan er ovurerrin av sínum landsstýrismanni

**Atli Hansen**
*form. Í Felagnum Nótaskip*



Til at byrja við vil eg fegin siga frá, at eg eri ógvuliga tilvitaður um mína dupultu støðu sum formaður í Felagnum Nótaskip og politiskur kandidatur. Míni ørindi við hesi grein eru sum formaður í Felagnum Nótaskip og sum ein, íð javnan hevur samskifti við Fiskimálastýrið at siga almenninginum frá nøkrum mannagongdum og fyribrygdum í hesum stýri, sum ikki kunnu góðtakast av Felagnum Nótaskip.

At greinin so kanska verður litað av, at ein við aðrari poilitiskari áskoðan enn eg, situr við róðri har, gerst ikki við. Vit eru ikki meira enn menniskjur, men atlitið til at kunna um, hvat íð gongur fyri seg, má telja meira enn persónligt erkvisni.

Tað sum mest hevur verið at hoyrt - og tað er nógv - um henda fiskimálaráharran í hansara skeiði, er okkurt um tunfiskaveiðu, hvalaveiðu og hvussu hann hevur stýrt teimum stóru londunum í svartkjaftasamráðingunum. Einki úrslit nakra staðni. Eingin áhugi og eingin umhugsan fyri heildini í verandi flota.

Herfyri sóu vit ein av okkara størstu skipabólkum - rækjuflotan - heita á landsstýrismannin um at fáa teirra trupulleikar viðgjørdar. Eingin bað um stuðul, men bara um loyvi til at greiða landsstýrismannninum frá, hvussu álvarsom støðan var. Men hvat gjørdi landsstýrismaðurin? Ikki eitt vet. Hann rann undan og vildi einki gera - í hvussu so er ikki fyri flotan sum heild.

Frá Felagnum Nótaskip hava vit javnan heitt á landsstýrismannnin um ikki at lata meira burtur av okkara kvotum, tí her verður galin endi. Og nú dregur álvarsliga á luftina. Men úrslitið hevur verið tað sama sum hjá rækjumonnunum. Einki svar og eingin kunning um broytingar. Tað má man sjálvur gita seg til.

Tá íð kvota verður sett á svartkjaftin og bara tey væntaðu uml. 15000 tons vera til hvørt av skipunum soleiðis sum tað sær út løtuni, so er einki út at geva fyri at fáa endarnar at røkka saman. Tað samlaða virði av øllum kvotunum hjá einum svartkjaftaskipi - sild, makrelur, lodna og svartkjaftur - verður tá millum 35 og 40 mió. kr. Hetta er gjørt upp við dagsins høgu prísum. Og vit vita at lond, sum vit samstarvast við sum strandalond til ymiskar stovnar, seta fram alt harðari krøv um niðurskurð av sild og makrelkvotuni. Hetta kan gerast veruleiki fyri 2003.

Tey nýggjaru nóta- og svartkjaftaskipini skulu hava inntøkur fyri uml. 40 mió. kr. fyri at svara hvørjum sítt. Bert eitt kvink niðureftir í fiskaprísum ella uppeftir í oljuprísum kann skjótt føra henda flotan út í somu trongu støðu sum rækjuflotin er í .

Kortini hevur landsstýrismaðurin aftur tikið burtur av makrelkvotuni hjá nóta-skipunum. 1500 íalt tons íalt ella uml. 10 % av tí, sum hesin bólkur higartil hevur fingið tillutað. 1000 av hesum tonsunum eru latin til ídaðarskipini sum hjáveiða til at fiska hestamakrel, hóast tað ikki er meira neyðugt hjá teimum, sum fiska hestamakrel at fáa makrel til hjáveiðu enn tað er hjá upsafiskarunum at fá eina seyðakvotu til hjáveiðu fyri at kunna fiska upsa..

Líknandi kvotur vóru í síni tíð latnar til t.d. Prestland, Fram, Pelagos og helst onkran annan. Ikki ein stertur av hesum makreli er fiskaður sum hjáveiða til nakað sum helst, men er friskaðaur beinleiðis sum makrelur og hevur tí bara verið við til at gjørt alt hetta øki til eina fløkju. Vanliga fáa vit einki at vita, tá íð sovorði hendir, men vit vóru spurdir, um vit vildu lata 200 tons av makreli til eitt skip, sum skuldi luttaka í royndarfiskiskapi eftir makreli komandi summar. Allir - bæðið vinnan og Fiskimálastýrið - vóru samdir um, at 200 tons var hóskandi og játtaðu. Men her er 500 tons farin burtur av - eingin veit til hvat.

Fyri at greiða fløkjuna eitt sindur varð avgjørt undir fyrrverandi landsstýrismanninum at lata ídnaðarbátunum endurgjald fyri at lata fiskiloyvi undir Føroyum innaftur. Teir fingu allir millum 2 og 3 mió. kr. í part fyri tað, sum teir sjálvir gjørdu upp til at vera 80 % av teirra fiskiskapi. Nú koma teir innaftur - ein í síðstu viku - hvør við sínum 20% ídnaðarloyvi og einstaklingar kunnu bara fara út til fiskimálaráðharran og biða sær kvotur burtur av hjá øðrum skipabólkum. Tað sær lætt út. Og so eru fleiri av hesum skipunum grundaði 100 % á útlendskan kapital.

Tað er torført at skilja, at sami flokkur, sum játtaði ídnaðartrolarunum 2 - 3 mió. kr. í stuðul fyri at lata loyvið inn og sum nú smátt um smátt er við at geva teimum loyvir aftur, ikki vil tosa við rækjuflotan um eina hjálpandi hond.

Hetta líkist søguni, sum vit nú frætta um í fjølmiðlunum og sum nú skal fyri rættin. Inndrigin loyvir verða útafturbýtt til

Felagið Nótaskip hevur eisini í longri tíð fyrireikað eina rættarsak, tí at man ikki fær landsstýrismannin á tal. Vit kenna øll søguna á tveimum reiðarum, sum bert við at leggja eina tekning av einum nýbygningi á borðið hjá landsstýrismanninnum fingu tillutað stórar sildakvotur, sum nú góðu teimum gomlu plimsollarunum, sum áður ikki kundu seljast, eitt virði uppá 10 mió. hvør og so vóru teir seldir eftir einum degi og tekningin til nýbygningin brend. Og annar liggur enn - 2 ár seinni.

Henda sakin við makrelinum til ídnaðarbátarnar gevur okkum helst eitt grundarlag fyri at leggja eina aðra rættarsak og fyri at fáa skipaði viðurskifti á okkara øki er helst neyðugt at leggja nakrar sakir og fáa dómstólarnar at vísa eina praksis, sum kann staðfesta hvør íð ræður yvir hvørjum. Í londunum rundan um okkum hevur man fyri langt siðan fingið skil á hesum og tað er eingin møguleiki fyri at leggja sama fantasi fyri dagin sum føroyski landsstýrismaðurin við fiskimálum javnan tykist at gera.

Men tað er ikki bara sum at siga tað. Tað er dýrt at føra sak í Føroyum. Og tað er stórt spell, at okkara landsstýrismaður í staðin fyri at koma upp á síðuna av okkum í vinnuni og berjast saman við okkum fyri at loysa trupulleikarnar skal leggja seg eftir at skapa trupulleikar, sum sum bæðið við sakarmáli og inntøkumissi álvarsliga eru við til at tyngja fíggjarliga um hjá hesum partinum av flotanum.

Tað er ikki lætt at leggja eftirfarandi rakstraræltlanir fyri fíggingarstovnarnar tá íð ein ongantíð kann rokna við, at næsta ár verður sum tað undanfarna.

Hetta ber ikki til í longdini. Tað má steðgast og vit mugu gera tað, sum er neyðugt.

# Viðmerking til grein hjá Ejleri Jakobsen í Sosialinum 6.3.2002

**Frits Strøm**

Eg havi ongantíð ætlað mær at lagt meg út í kjak í bløðunum um fiskiskap. Men táið Ejler skrivar á handan hátt, føli eg meg noyddan til at koma við einari rættleiðing,av tí at eg havi verið við og havt við íðnaðarbátar at gjørt síðani 1991. Síðst vit hildu lágan profil blivu vit blakaðir av Føroyagrunninum uttan sakliga grund.Tá var tað ein annar veiðibólkur sum dugdi at rópa hart í bløðunum.

Um hvør í eigur mesta rættin til Svartkjaftin í mun til grannalond okkara eri eg samdur í.Um hvussu nógv Svartkjaftaloyvir eru og skulu verða, fari eg ikki at leggja meg út í,tað tekur fiskimálaráðharrin sær av. Ejler skrivar at trupulleikin er innanhýsis, tað er rætt men hvar?

Tá ið Ejler skrivar at íðnaðarskipini ikki hava søgulig rættindi til svartkjaftin, mótsigur hann sær sjálvum, tí í greinini stendur hjáveiðan av Svartkjafti var 30%. Mær vitandi var veiðan á kantinum eystanfyri norður ímóti Fugloyar Bankanum um vári næstan bara Svartkjaftur, og seinni um heystið, táið vit komu aftur úr Norðsjógvinum "millum" Bankarnar.Eisini sunnanfyri Skeiva Banka var bert Svartkjaftur, men hattar vita teir skiparir sum vóru tá betur enn eg.

Um hýsuyngulin er at siga at royndir vóru gjørdar við rist,og vóru tær so góðar,at tað ikki var nakar trupulleiki við Hýsuni meira. Tað vita menn á Fiskiransóknarstovuni sum vóru við til hendan fiskiskap.Eisini bleiv bóklingur gjørdur um fyrimunir og vansar við íðnaðarveiðini landsbúskaparliga,og talaði hann greitt fyri framhaldi. Um tey "oyrini "sum hvør bátur fekk, er at siga at tær blivu bornar niðan í bnkan, og síðani fór so gott sum allir bátarnir á heysin, eftir ikki at hava verið á Føroyagrunninum í hálvt annað ár.

Til síðst vil eg bara fegnast um tan stóra framburð tey stóru nótaskipini hava veri fyri. tað gagnar øllum. Hóast tað kann tað ikki vera meiningin at allir aðrir fullkomuliga skulu burtr úr myndini.

# Suðuroy og veiðubann

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Hví er einki veiðubann ella stongd økir á Suðuroyarleiðini?

Ein orsøk má vera, at fiskurin, sum svimur her fullur av rogni og sili, ikki gýtur, tí annars skuldi kunngerð um avmarka veiðubann eisini verði galdandi fyri økir rundt Suðuroy. Tað kann eisini verað ein onnur orsøk, og er tað, at fiskivinnumálaráðharrin heldur, at eingin orsøk er at bannað fisking á Suðuroyarleiðini tí har eru ongar stemmur at fiska eftir alíkavæl.

Hygg at Føroyakortinum, so sært tú, at veiðubann og stongd økir eru allastaðni uttan á Suðuroyarøkinum, orsøkin kann bert verða, at fiskurin ikki gýtur, sjálvt um hann hevur rogn og sil, ella at ongar stemmur eru at fiska her suðri.

Útróðrarmenn í Suðuroy hava eisini roynt, at gera vart við sína ónøgd, sum útróðrarfeløgini norðanfyri nú gera við einum mótmælisskrivi. Her suðri er tað ikki friðingarøkir ella veiðubann, sum hava órógva útrórabátarnar, men sum norðanfyri, trolingin á landleiðini og teir stóru línubátarnar, sum hava loyvi at royna millum 6 og 12 fjóðringar úr landi.

Útróðrarmenn í Suðuroy mugu hava rætt til at fiska, uttan at verða órógvaðir óneyðugt, soleiðis sum teir eru blivnir, nú í nógv Harrans ár. Tí má fiskaríði hjá trolbátum og stóru línubátum avmarkast við stongsli á ávísum økjum rundt Suðuroy, so at útróðrarbátar fáa ein kjans, at fiska í friði á hesum stongdu økjunum.

At eingin vil ella hevur gjørt nakað kann ikki góðtakast, og má tað tí verða eitt krav frá suðringum, til landsins myndugleikar, at okkurt skilagott verður gjørt, so at útróðrarmenn í Suðuroy fáa ein rímuligan kjans til at fiska, so at teir og teirra familjur kunnu liva av tí.